# Burturkast frá skipum í stríð við havumhvørvislógina

**Kitty May Ellefsen, ið hevur lagt fram eina verkætlan sum ritgerð um havumhvørvisvernd og dálking frá fiskiskipum, staðfestir, at hóast høvuðslógarkarmarnir í Føroyum eru til staðar, verður nógv burturkast tveitt í havið**



*Tekstur: Kanningin av burturkasti frá fiskiskipum staðfestir, at 56% av skipunum beina alt hart burturkast í havið. Hart burturkast stavar í fyrsta lagi frá provianti, sum nýttur verður umborð. Myndin er tilvildarlig.*

HAVUMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í innganginum til verkætlan sína, sigur Kitty May Ellefsen, at menniskjaligu árinini á havumhvørvið eru vaksandi. Hetta er partvís orsakað av burturkasti frá skipum.

Hon vísir á, at verjan av havumhvørvinum móti dálking av burturkasti frá skipum, er vanliga ásett við tjóðarlóggávu saman við altjóða og millumtjóða sáttmálum. Ein hin týdningarmesti sáttmálin í altjóða høpi, er Marpol-sáttmálin, sum hevur til endamáls at steðga dálking av havinum, bæði av hørðum, flótandi og rakstrarburturkasti.

– Sum høvuðsreglu skulu øll hesi sløg av burturkasti vera umborð á skipunum, til skipið kemur í havn, har burturkastið skal koyrast í land. Á landi er vanliga ein móttøkuskipan, ið tryggjar, at burturkastið verður fyribeint á ein umhvørvisvinarligan hátt.



*Skip yvir 400 brt. skulu føra oljujournal um spillolju. Skipaeftirlitið hevur ábyrgdina av eftirlitinum, men eftirlit verður einans framt fjórða hvørt ár - og fyri tey smærru skipini er einki eftirlit*

### Okkara ábyrgd

Hon sigur, at í Føroyum er tað havumhvørvislógin frá 1999 saman við kunngerðum, sum regulerar hetta økið. Av tí, at lógin er donsk, hevur tað verið danski umhvørvismálaráðharrin, ið hevur havt yvireftirlit við lógini. Men fyri sløkum árin síðan vórðu havumhvørvismálini yvirtikin av Føroya landsstýri. Í hesum sambandi undirskrivaðu danski og føroyski umhvørvismálaráðharrin eina avtalu um samstarv innan havumhvørvisøkið.

– Í høvuðsheitum hevur yvirtøkan av málsøkinum givið løgtingi og landsstýri lóggávu-og umsitingarvald á økinum. Men tað verður innan karmarnar av altjóða rætti, at lóggáva og umsitingarvald skulu fremjast.

Kitty May vísir á, at havumhvørvisvernd í altjóða sjógvi í stóran mun er regulerað í altjóða sáttmálum.

– Á føroyskum sjóumveldi er lóggávuvaldið hjá Føroya løgtingi, og er ikki avmarkað av altjóða rætti. Hetta merkir, at strangari reglur kunnu setast í gildi innan føroysk sjóøki, um tað er ynskiligt, sigur hon.

### Burturkast í havið

Kitty May staðfestir í verkætlanini, at høvuslógarkarmarnir í Føroyum eru til staðar, tá ið ræður um havumhvørvi. Kortini staðfestir tann parturin av verkætlanini, ið snýr seg um burturkast frá skipum, at nógv verður tveitt í havið í stríð við havumhvørvislóggávuna. Hetta er burturkast, sum átti at verið tikið við aftur til lands.

Hon sigur, at talan serliga er um hart og rakstrarburturkast.

– Hart burturkast stavar frá vanligum provianti – mati, plastikk íløtum og øðrum, ið stendst av at halda eitt vanligt húsarhald umborð.

Kitty vísir á, at eingin kanning er gjørd síðan 1996, sum prógvar í hvussu stóran mun føroysk skip tveita burturkast í havið.

### Endamálið

Verkætlanarleiðarin sigur, at endamálið við arbeiðinum, sum gjørt er, er at finna út av, hvussu vit í Føroyum kunnu liva upp til og lúka tær skyldur, ið Marpol-sáttmálin ásetir.

– Fyri at náa hesum máli, er neyðugt fyrst at kanna, í hvønn mun føroysk skip fylgja lóggávuni, sum setir bann fyri tøming av burturkasti í havið. Eisini er neyðugt at lýsa, hvussu ein føroysk móttøkuskipan kundi verið sett saman, soleiðis at hon lýkur altjóða krøv á økinum.

Í verkætlanini lýsir hon eisini føroysku lóggávuna, eins og greitt verður frá altjóða og millumtjóða sáttmálum á økinum.

Kitty May samanber eisini okkara lóggávu við lóggávuna í øðrum londum, og hon setir spurningin, um okkara lóggáva er nøktandi.

Verkætlanin er greidd úr hondum sum ein ritgerð, sum kann verða avvarðandi myndugleikum at gagni, sigur Kitty May Ellefsen.





*Nógvir trupulleikar eru við móttøkuskipanunum á landi. Hesar skipanir eru kravdar við lóg, men lóggávan áleggur ikki skipum at nýta móttøkuskipaninar. Tó ásetir lóggávan, at tað er bannað at koyra burturkast í havið*

# Lógin eigur at áleggja skipum at føra burturkastið til lands

**- Nógvir trupulleikar eru við móttøkuskipanunum á landi, og lóggávan áleggur ikki skipum at nýta hesar skipanir. Tó ásetir lóggávan, at tað er bannað at koyra burturkast í havið, og at havnirnar skulu hava móttøkuskipanir. Einki eftirlit hevur seinastu árini verið við móttøkuskipanunum til hart og rakstrarburturkast, sigur Kitty May Ellefsen, ið hevur kannað hesi viðurskifti**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Landsstýrið arbeiðir við lógaruppskoti um havumhvørvisvernd, sum skal fyribyrgja og avmarka dálking og onnur árin, serliga á havumhvørvið. Lógin skal eisini áseta reglur fyri tilbúgving móti dálking á havi, í fjøru og í havnum*

Í samband við verkætlanina hjá Kitty May Ellefsen um havumhvørvisverndartiltøk og burturkast frá skipum, hevur Gallup Føroyar gjørt kanningina, sum snýr seg um, hvørt føroysk skip fylgja lóggávuni, sum setir bann fyri tøming av burturkasti í havið. Kanningin umboðar 33% av øllum skipum og bátum yvir 12 brt., skrásett í Føroyum í 2003. Av hesum skipum eru 69% yvir 100 brt.

Kanningin staðfestir, at 56% av skipunum beina alt hart burturkast í havið.

– Men tá ið talan er um rakstrarburturkast, svara 82%, at burturkastið verður tikið við til lands. Í hesum førinum er mistur reiðskapur ikki íroknaður.

Tá talan er um flótandi burturkast, siga 96% av skipunum, at spillolja verður avreidd til móttøkuskipanina á landi.

### Móttøkuskipanin haltar

– Vert er í hesum sambandi at leggja til merkis, at 69% av skipunum halda, at móttøkuskipanin á landi ikki er nøktandi, sigur Kitty May.

Verður kanningin av skipum samanborin við kanningina um nýtslu av móttøkuskipanun, har havnafútar meta um í hvønn mun skip nýta móttøkuskipaninar á landi, siga 37% av spurdu havnafútunum, at minni enn 30% av skipunum avreiða hart og rakstrarburturkast. 40% av havnafútunum vita ikki, hvussu nógv skip nýta móttøkuskipanina. 12% av havnafútunum meta, at øll skip avreiða burturkastið til móttøkuskipanina á landi.

– Eins og skipini, halda flestu havnafútar, at verandi móttøkuskipan ikki er nøktandi, sigur Kitty.

Hon vísir á, at nógvir trupulleikar eru við móttøkuskipanunum, og lóggávan áleggur ikki skipunum at nýta hesar skipanir.

– Lóggávan ásetir tó, at tað er bannað at koyra burturkast í havið, og at havnirnar skulu hava móttøkuskipanir. Einki eftirlit hevur seinastu árini verið við móttøkuskipanunum til hart og rakstrarburturkast..

Kitty sigur, at tá ið talan er um eftirlit við spillolju, skulu skip yvir 400 brt. føra oljujournal. Ábyrgdina av hesum hevur Skipaeftirlitið, men eftirlit verður einans framt fjórða hvørt ár. Fyri smærru skipini er einki eftirlit.

### Yvirornaður leistur

Í niðurstøðuni staðfestir hon, at nógv kann gerast fyri at bøta um móttøkuskipaninar í føroyskum havnum.

Hon vísir á, at sonevndi "no special fee" leisturin kann setast í verk.

– Ein yvirornaður leistur eigur at gerast soleiðis, at havnir og skip vita, hvussu hesi skulu fyrihalda seg til burturkastið. Lóggávan eigur at áleggja skipum at avreiða burturkastið til havnirnar. Hetta burturkast skal síðan skrásetast soleiðis, at eftirlit kann haldast við, um skip fylgja reglunum. Skipini eiga eisini at føra journalir yvir hart og rakstrarburturkast.

IMO staðfestir, at tað hevur týdning fyri verju av havumhvørvinum, at reglurnar á økinum verða handhevaðar.

Kitty May sigur, at føroyska lóggávan um havumhvørvisvernd fylgir teimum áleggingum og treytum, sum Marpol sáttmálin ásetir. Tó vantar ein grannskoðan av lóggávuni.

– Nevnast kann, at landsstýrið arbeiðir við einum lógaruppskoti um umhvørvisvernd. Havumhvørvismálini eru yvirtikin av Føroya Landsstýri, og í høvuðsheitum hevur yvirtøkan av málsøkinum givið løgtingi og landsstýri lóggávu-og umsitingarvald á økinum.

### Eingin handhevan

Hon sigur, at høvuðslógarkarmarnir í Føroyum eru til staðar, tá ið ræður um umhvørvisvernd, men samstundis kann eisini staðfestast, at nógv burturkast frá føroyskum skipum verður tveitt í havið í stríð við havumhvørvisverndarlógina.

– Eingin verulig handhevjan fer fram av reglunum, og móttøkuskipaninar á landi liva ikki upp til krøvini um móttøkuskipanir sambært Marpol-sáttmálanum, sigur Kitty May Ellefsen, at enda í niðurstøðu síni.